

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Pedagogur til Dagstovnin við Botnánna

Søkt verður eftir einum pedagogi, til fyribilsstarv, at arbeiða 35 tímar um vikuna í barnagarðinum at byrja 1. desember 2007 ella eftir nærri avtalu. Starvstíðin er fram til 31. juli 2008.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Botnánna, Botnavegur, 410 Kollafjørður, í hendi seinast fríggjadagin 9. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Siv Joensen, stovnsleiðara, telefon 22 13 23.

## Hjálparfólk til Býlingshúsið í Maritugøtu

Søkt verður eftir einum hjálparfólki fyri hjálparfólk í barsilsfarloyvi, til barnagarðsstovu, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. november 2007.

Starvstíðin er frá 15. november 2007 til 30. juni 2008.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum í Maritugøtu, Maritagøta 50, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 9. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir, stovnsleiðara, ella Nancy Hentze, varaleiðara, á telefon 30 24 00 ella 27 29 29.

## Skrivstovufólk til roknskapardeildina

Søkt verður eftir skrivstovufólki til roknskapardeildina at seta skjótast møguligt.

Høvuðsuppgávurnar eru innlesing (skanning) og avgreiðsla av rokningum, avstemman av kreditorum og aðrar bókhaldsuppgávur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hera Olsen, fíggjarleiðara, ella Tinu Johannesen, fíggjarfulltrúa, á telefon 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 100 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 9. november 2007.

## Pedagogur til Dagstovnin í Øksnagerði

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 33 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerð 1, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, ella Gunrid á Plógv, varaleiðara, telefon 30 22 60 ella 21 99 59.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**